# Skulu syngja meiri í skúlunum

**Jógvan á Lakjuni fer nú senda skriv í hvønn skúla, við boðum um at syngja meiri við børnunum**

LANDSFUNDUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður í mentamálum ætlar sær nú at taka eitt tak fyri at varðveita tann partin av okkara mentanararvi, sum hann nevnir okkara sangskattur.

Á landsfundinum hjá fólkaflokkinum leygardagin, boðaði hann frá, at hann nú fer at senda skriv í hvønn skúla við boðum um at syngja meiri við børnunum.

Og tá ið hann vil hava børnini at syngja meiri, hugsar hann um føroyskar sangir.

Hann helt, at okkara sangskattur hevur eitt stórt mentanarligt virði, sum tað er vert at varðveita og við at leggja størri dent á at læra skúlabørnini at syngja, heldur hann at stuðlast kann uppundir at varðveita hendan partin av okkara mentanararvi.



*Jógvan á Lakjuni heldur, at føroysk skúlabørn skulu læra at syngja. Sjálvur leggur hann stóran dent á sang og á landsfundinum hjá Fólkaflokkinum smæddust hann ikki fyri at mýkja tangentarnar*

# Samstarvið í samgonguni er fyrimyndarligt

**Á landsfundinum hjá fólkaflokkinum leygardagin, stórfegnaður fólkafloksmenn um samstarvið við sambandsflokkin og javnaðarflokkin**

LANDSFUNDUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Á landsfundi hjá fólkaflokki leygardagin fingu teir 60 áhoyrararnir at vita frá polikarunum, at stevið í samgonguni er fyrimyndarligt. Men onkur helt, at tað hevði verið í so gott*

Samstarvið í samgonguni er fyrimyndarligt.

Tað staðfestu fleiri politikarar hjá fólkaflokkinum á landsfundinum í Øravík leygardagin.

Jørgen Niclasen, formaður fólkafloksins á Løgtingi, fortaldi fundarfólkinum, at samstarvið í samgonguni var týðiliga merkt av, at allir flokkar høvdu viljan til samstarv.

- Sjálvur havi eg verið við í seks samgongum, men eg tori at siga, at hendan hevur verið tann besta at loysa ósemjur og finna semjur, segði hann.

- Tá ið vit hava sett okkum saman, hevur tað borið til at koma á mál á nógvum málum-men ikki øllum kortini.

Eisini formaðurin í Fólkaflokkinum, Anfinn Kallsberg, segði, at samstarvið í samgonguni var ógvuliga konstruktivt, har tað bar til at koma til orðanna. Tá ið flokkarnir vóru ójavnir á máli.

- Fólkaflokkurin hevur sitið í samgongu í 10 ár og tað gevur okkum stórar royndir í at vera í samgongu og avgjørt eisini gott innlit. Tí verða okkara sjónarmið hoyrd og sostatt endar tað eisini ofta við, at tað verður politikkurin hjá Fólkaflokkinum, sum eisini verður politikkurin hjá samgonguni, segði Anfinn Kallsberg.

Jacob Vestergaard, landsstýrismaður var samdur. Hann var eisini í undanfarnu samgongu og helt, at her var munur á, tí samstarvið í undanfarnu samgongu var í stóran mun merkt av klandri.

- Hendan samgongan er merkt av, at allir flokkar vilja samstarva.

Eisini Kjartan Joensen og aðrir politikarar hjá flokkinum fegnaðust um samstarvið.

### Samstavið mestsum ov gott

Men tað vóru ikki øll, sum vóru heilt samd í, at hetta var bara av tí góða.

Annika Olsen, sum umboðar Fólkaflokkin í Tórshavnar Býráð, helt, at stevið í samgonguni hevði verið í so gott.

Hon helt, at tað eru summi, sum leggja ov stóran vilja í at varðveita samgonguna

Í hesum sambandi harmaðist hon um og helt, at tað er ein vanlukka, at studentaskúli ikki verður bygdur í Marknagili, soleiðis, sum tosað hevur verið um og hon harmaðist eisini um, at miðnámsskúlin varð fluttur úr Vági.

- Men øll hesi málini vórðu vavd upp í ein ellibita, tí onkur vildi hesi samgonguni so væl, at hon mátti halda fram.

Hesum varð Jógvan á Lakjuni ikki samdur í. Hann ivaðist ikki í, at tað var tann betra loysnin at byggja miðnámsskúlan í Hovi.

- Tað tykist sum um at tey flestu hava gloymt, at vit at byggja í Hovi, hava vit fingið heilsuskúlan upp í, so at vit bæði fáa loyst hølistrupulleikarnar hjá studentaskúlanum og heilsuskúlanum í einum.

Hann helt eisini, at tað var ein góð loysn, sum varð funnin í Marknagili, tí skuldi studentaskúlin verið uppi í, hevði talan verið um eina bygging, sum varð so dýr, at hann stúrði fyri, at hon hevði aldrin verðið veruleiki.

# Jørgen Niclasen skal føra Fólkaflokkin til sigurs

**Fólkaflokkurin ætlar at seta øll segl til fyri at vinna næsta løgtingsval so dyggiliga**

LANDSFUNDUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Fólkaflokkurin fer nú at seta øll segl til, fyri at vinna næsta Løgtingsval.

Og fyrireikingarnar skulu byrja beinanvegin.

Tað varð ført fram á landsfundinum hjá Fólkaflokkinum leygardagin.

Og stendur tað til formannin í flokkinum, Anfinn Kallsberg, skal tað verða Jørgen Niclasen, løgtingsmaður, sum skal verða høvuðs-strategurin í valstríðnum.

Á landsfundinum helt Annika Olsen, býráðslimur í Havn, at tað vóru ov fáar kvinnur í politikki og tað er ein veruligur trupulleiki.

Tí vildi hon hava at vita, hvat Fólkaflokkurin ætlar at gera fyri at menna javnstøðu í flokkinum.

Í hesum sambandi helt hon, at tað einasta rætta var at flokkurin beinanvegin fór undir at manna listarnar til næsta løgtingsval, so at konufólk fingu ein møguleika at gera vart við seg.

- Tað er alt ov seint at fara undir eitt valstríð tveir, tríggjar mánar undan valinum, tí tað ger, at fleiri kvinnur bera seg undan.

### Jørgen skal vísa vegin

Formaðurin í Fólkaflokkinum, Anfinn Kallsberg, tók fult undir við hesum.

- Vit eiga beinanvegin at fara undir at fyrireika næsta val fyri at vinna valið so dyggiliga. Tí eiga vit longu nú at umhugsa, hvussu vit skulu bera okkum at.

Í hesum sambandi helt hann, at flokkurin eigur at fáa dynamiskar kreftir at stíla fyri, so at valið kann vinnast.

- Og mítt fyrsta uppskot er at flokkurin setir Jørgen Niclasen at standa á odda fyri komandi valstríðnum. Segði Anfinn Kallsberg

Bjarni Djurholm, segði, at tað verður ikki við honum sum landsstýrismanni í javnstøðu, at vit fara at løggeva kvinnur á ting, sum hann málbar seg.

Hann helt, at tað, sum hevði eina størstan týdning fyri javnstøðu, var, at konufólk gjørdust fíggjarliga óheft av monnunum og tí helt, at útbúgving var ein høvuðslykil til javnstøðu.

Men hann vísti á, at hann arbeiddi við fleiri átøkum fyri at menna javnstøðu, so at tað verður natúrligari at fáa fleiri kvinnur upp í politikk. Eitt nú verður arbeitt við eini kjaksíðu.



*Annika Olsen, býráðslimur í Havn, vm. Undir liðini á mammu sínu, Marnu. Hon vil hava Fólkaflokkin at leggja meiri dent á at fáa fleiri kvinnur upp í politikk*